Eysturbúgvin og Hoyvíkingur á Sandi

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Ein trolari og ein línubátur hava landað til Sandoy Seafood hesa vikuna.

Mánadagin var Eysturbúgvin inni við sløkum 100.000 pundum av upsa, toski og hýsu. Teir trola saman við Vesturbúgvanum, sum hevði nøkulunda somu nøgd, men landaði til annað virki. Meira enn helmingurin av upsanum hjá Eysturbúgvanum var upsi 4, og tað er rættiliga smáur upsi.

Hoyvíkingur, sum landaði týsdagin, hevði 50.000 pund; teir høvdu roynt á Føroya Banka. Størra helvtin av veiðini var hýsa, restin toskur. Í báðum førum var slagið gott, siga tey á Sandi. Umleið helmingurin av veiðini var hýsa 1 og toskur 1. Hoyvíkingur hevði stuttan túr; teir høvdu roynt í seks dagar, tá ið hann øtlaði veðrið.

Samanhangandi

Bæði á virkinum á Sandi og í Skopun hava tey arbeitt hvønn dag hesa vikuna, tí umframt fiskin hjá Eysturbúgvanum og Hoyvíkingi, hevur Sandoy Seafood keypt væl av fiski á uppboðssølu.

- Eg veit ikki rættiliga, hvussu nógv er komið av uppboðssøluni, men her hava fleiri trailarar verið við fiski. So, vit hava fisk til alla hesa vikuna, sigur Jóan Petur Vest.

Lodnufiskiskapurin tarnaður av veðri

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Krúnborg var á Fuglafirði mikudagin við 1800 tonsum av lodnu, sum teir hava fiskað á føroysku leiðini. Teir fóru útaftur mikukvøldið og fóru aftur í føroyskan sjógv at royna.

Síðsta vikuskiftið var Christian í Grótinum á Fuglafirði við stívliga 1500 tonsum av lodnu, eisini úr føroyskum sjógvi.

Triðja skipið, sum hevur verið á føroysku lodnuleiðini, er Tróndur í Gøtu, men teir hava ikki verið so hepnir.

Tvær ferðir í Íslandi

Áðrenn Tróndur í Gøtu fór í føroyskan sjógv at royna, fóru teir til Íslands eftir trolreiðskapi. Men tá ið teir komu á fiskileið, vísti tað seg, at reiðskapurin riggaði ikki so væl, og lítið kom burtur úr. Teir hava tí fyri aðru ferð á hesum sinni verið í Íslandi eftir reiðskapi og tað, teir høvdu inni, løgdu teir upp har yviri, eini 300 tons ella so.

Á Havsbrún vita tey at siga, at lodnufiskiskapurin í føroyskum sjógvi hevur verið smáligur, nú tað hevur viðrað so illa.

- Ein skái var miðskeiðis í vikuni, men nú sigur hann longu nógvan vind aftur, siga tey á Havsbrún.

Gorpur fór at leka, tí eitt rør skrædnaði

Sjógvurin í maskinrúminum er gingin útyvir ljósmotorar, elektromotorar og elinnstalatiónina.- Umvælingarnar verða gjørdar á Mekanik í Runavík, og her er tað soheppið, at alt, sum skal skiftast út, er á goymslu, sigur maskinmeistarin á Skrápi, Karl Jón Breiðaskarð

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Manningarnar á Gorpi og Skrápi halda ikki, at tyrlan hjá Atlantsflogi var skjót á staðnum, tá ið Gorpur fór at leka og hevði brúk fyri hjálp. Tað gingu tveir tímar, áðrenn tyrlan var frammi hjá skipunum.
- Tíðin tykist altíð long, tá ið bíðað verður undir slíkum umstøðum. Menmanningin var ongantíð í vanda, sigur Karl Jón Breiðaskarð, sum er maskinmeistari við Skrápi

Tað er og verður ongantíð vandaleyst at sigla, hóast skipini gerast betri og betri. Hvussu góð skipini enn eru, sleppa vit ongantíð undan, at vanlukkur fara at henda á sjónum.

Fyrr í vikuni fór ísfiskatrolarin, Gorpur, at leka. Teir partrola við Skrápi og vóru á veg út á fiskileið, tá ið funnið varð út av, at sjógvur var í maskinrúminum.

30 fjórðingar úr landi

Karl Jón Breiðaskarð, sum er maskinmeistari við Skrápi, sigur, at skipini loystu um 1-tíðina týsnáttina og vóru einar 30 fjórðingar úr Eystnesi, tá ið funnið varð út av, at sjógvur var í maskinrúminum.

- Tá ið teir umborð á Gorpi varnaðust lekan, stóð sjógvurin uppum botnventilarnar. Teir settu pumpurnar at lensa, men sóu skjótt, at tær ikki kláraðu at halda skipinum lens; tí varð motorurin slóktur, sigur Karl Jón.Boð vórðu send eftir hjálp, og tyrlan hjá Atlantsflogi og Tjaldrið gjørdu seg til reiðar at flyta pumpur út á skipið.

Sum skilst, gingu heilir tveir tímar, til tyrlan var á leiðini, og tá var Tjaldrið næstan komið út til Gorp og Skráp.

Ikki í lívsvanda

- Eg haldi, at tyrlan fekk pumpur frá Tjaldrinum, sum teir settu niður á Gorp, men áðrenn pumpurnar vóru komnar í gongd, var Tjaldrið komið á leiðina. Og ikki fyrr enn Tjaldrið eisini fór at pumpa, kundu teir halda skipinum lens.

Spurdur, um teir hildu, at tað tók ov langa tíð hjá tyrluni at koma út á leiðina, sigur Karl Jón:

- Tað dugi eg ikki at meta um, men eg haldi ikki, vit kunnu siga, at tyrlan var skjót á staðnum. Tíðin tykist altíð long, tá ið bíðað verður undir slíkum umstøðum.

Karl Jón leggur tó dent á, at eingin panikkur var umborð á Gorpi, og menninir vóru ongantíð í lívsvanda.

- Veðrið var gott, men tað var stór alda, sigur hann.Tá ið partrolað verður, fylgjast skipini, og sigast kann, at hetta í sjálvum sær er ein tryggleiki – ikki minst, tá ið annað skipið hevur brúk fyri hjálp.

Tjaldrið fylgdi Gorpi til lands.

Rør skrædnað

Karl Jón Breiðaskarð sigur, at tað seinni vísti seg, at lekin stavaði frá einum røri, sum gongur frá botnventilunum upp í høvuðsmotorin.

- Hetta rørið var skrædnað, sigur hann.

Hví rørið er skrædnað, er ikki greitt, men maskinmeistarin heldur ikki, at hetta hevur nakað samband við tær umvælingar, sum gjørdar eru umborð á Gorpi, nú hann hevur verið til klassingar.

Hetta var fyrsti túrurin hjá Gorpi og Skrápi síðan hálvan desember. Sjógvurin í maskinrúminum er gingin útyvir ljósmotorar, elektromotorar og el-innstalatiónina í maskinrúminum.

- Umvælingarnar verða gjørdar á Mekanik á Runavík, og her er tað so heppið, at alt, sum skal skiftast út, er á goymslu.

Karl Jón Breiðaskarð væntar, at skipið verður klárt at fara aftur til fiskiskap um eina viku.

Mostir Charley liðug fyri hesuferð

SJÓNLEIKUR
Solby A. Eliasen

Farna vikuskiftið framførdi Klaksvíkar Sjónleikarafelag tær seinastu sýningarnar av skemtileikinum Mostir Charley – á hesum sinni. Tí um vit fylgja hagtølunum, so verður leikurin aftur á skránni í 2045. Leikurin hevur verið framførdur tvær ferðir áður, og vóru tað júst 44 ár ímillum hvørja ferð.

Frá Klaksvíkar Sjónleikarafelag frætta vit, at umleið 3.500 fólk hava sæð leikin, og tað eru tey stak væl nøgd við. Tey byrjaðu at venja 1. septembur, frumframførslan var 10. novembur og nú, aftaná 30 sýningar, eru fólk við at blíva troytt. Her er jú talan um eitt áhugafelag, so tað er týdningarmikið, at limirnir ikki gerast ov troyttir.

Fyri framman liggja nú fyrireikingarnar til Norðoyastevnuteitið, og ætlanin er at venja tveir leikir í 2002. Venjingarnar til tann fyrra leikin byrja í heyst, og so verður frumframførslan einaferð í novembur ella desembur, meðan hin leikurin verður fyrireikaður yvir eitt longri tíðarskeið.

Tað er ein bólkur undir Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum hevur ætlanir at venja 1-2 ferðir um vikuna í umleið 1 ár.

Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevur eisini ætlanir um at vera við í tí stóra gøtuleikinum, sum MáF skipar fyri á Ólavssøku.

Umleið 3.500 fólk sóu Mostir Charley

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 1. februar til hósdagin 7. februar



Lindin sendir alla náttina

Frá 1. februar fer Lindin at senda alla náttina, til kl. 6 á morgni, hvønn dag. Lindin hevur sent síðan 21. januar 2000 og sosatt sent í júst 2 ár, gavst at senda kl. 23 gerandisdagar og kl. 4 leygarmorgun og sunnumorgun. Nú verður hvørja nátt sent blandaður tónleikur og styttri sendingar, so sum »Dagsins Orð«, »Okkara Dagliga Breyð«, »Bankabók Trúarinnar« o.a. Kl. 2 verða sendingar sum eru ein tíma og longri at hoyra, millum annað »Alfa og Omega«, »Tónar & Innihald«, »Bønarlinjan« og Møti verður eisini at hoyra tá. Leiðslan á Lindini vónar at tað verður til signing fyri lurtarar at nú verður sent til kl. 6 hvønn morgun.

Múlatrútin viðmerkjari og miðvíkingur, ið ikki er til

Dagfinn Olsen ummælir:

Úff, uff og aftur uff. Úf!

Fyrst nøkur súrgað orð um miðvíkingar, sum ikki eru til, men sum tó fanga stórar fiskar.

Álvaratos, ÚF vertir. Nú mugu tit taka tykkum saman. Gerandisprát og sampakkandi villur bera vit dagliga yvir við, væl vitandi, at hett er ikki at sita fyri opnari mikrofon.

Men tað er, sum lekkar staðið.

Fyri kortum varð eitt nýtt slag av føroyingum uppfunnið í ÚF. Miðvíkingar, ella hvussu hetta skal stavast.

Eingin bygd eitur Miðvík! Tískil finnast hesi fólk ikki í veruleikanum.

Skal eg eiga leiklutin at minna á hetta, so lat fara: fyri at verða nevndur -víkingur má ein koma úr eini vík, t.d. klaksvíkingur ella hoyvíkingur. Tískil blívur ein maður úr Miðvági ikki víkingur uttan hóvasták, hvussu nógv hann so fiskar, tí bygd hansara er ein vág – ikki vík. Tí eina fiskiklógv úr Miðvági var tað, ið talan var um henda dag í ÚF.

Annars gerst heldur tungt at hoyra ymisk orð koma upp at venda, gerast mótaorð millum landsins kosnu og onnur, fyri síðani at verða nýtt og misnýtt í tað óendaliga. (Hvør minnist ikki lagkøkur, »alt annað líka« ella »í og fyri seg«).

Um eg t.d. nevni orðið »scenario« (ella hvussu tað skrivast), so skilja helst nøkur hvat eg meini, síðani ein landsstýrismaður byrjaði at nýta hetta í tíð og ótíð og onnur síðani hava gjørt tað sama.

Hvussu nógv í veruleikanum kenna og skilja orðið, skal ikki her metast um, men vert er at sláa tað upp í onkrari stórari bók, tí tað verður ofta havt á munni í miðlunum.

Uppafturhitað súpan

At vera múlatrútin merkir sambært orðabókini, at ein er illa hýrdur, súrur.

Tá eg settist at skriva hesar reglur gjørdist eg sett at siga illa við. Um ikki súrur, so kanska illa hýrdur.

Tí hvat havi eg sæð ella hoyrt farnu vikuna í loftmiðlunum, ið er vert nakrar reglur so ella so?

Nei, næstan einki rennur mær í hug. Jú, Zacharias Hammer vitjaði Gásadal, frálíkt, men tað var ikki nú í vikuni.

Á, ja!!! Okkurt var úr Múla í Svf.

Sum heild dámar mær væl tilfarið, ið Studio Pegasus letur Útvarpinum. Nýtt úr Norðoyggjum er ofta áhugavert at frætta og Fólk og frítíð riggar væl, eins og skemtiliga undirhaldið við fráliku smakkingini.

Síðani hevur ÚF eisini sent Pegasus framleiðsluna Aftur til Múla, ið var í fleiri pørtum, men tó á góðari leið.

Men nú skuldu vit so aftur Aftur til Múla. Spennandi, hóast alt, tí nú komu vit aftur sum sjónvarpshyggjarar.

Vakrar myndir og so framvegis. Men vit høvdu hoyrt hatta áður, um enn vit ikki høvdu sæð. Vit kendu og vistu tað mesta.

Og lítið flog var yvir sendingini. Varislig klipp, myndin av bygdini sera ofta úr sama stað á smala vegnum, meðan tónleikurin leikti, fylti út.

Eg eri ikki hann, ið ætli at taka mótið og virkisfýsni frá nøkrum. Tvørturímóti! Hatta var væl framleitt av leikfólki, hevði kanska ikki verið betri, um Svf átti heiðurin av sendingini.

Men hatta er nú einaferð uppafturhitað súpan!

Tað er vert at hava í huga, tá framleitt verður. Gamani, tvær flugur við eitt smekk (viðkomandi í Norðoyggjum í hesum døgum, skilst), men fyri at fanga í aðru atløgu má meira til, enn bert myndirnar afturat søguni, ið jú er søgd so greitt og væl í ÚF. Kanska meira ferð, okkurt annað krydklari, hvat veit eg?

Ikki tí, fólk flest hava óivað hugnað sær við hesi sending, tí sendingini var á eini leið, rætt skal vera rætt. Vit bíðu spent eftir øðrum parti.

Tann, ið træðkar fram, má tola at verða vigaður og dømdur. Og rós má tað verða til fólkini »har Norðri«, at ummælarin einki annað (føroyskt) minnist í skrivandi løtu, enn sendingina frá Pegasus.

Eri so púra samdur við mín góða vin á Dimmu, G.L.P, tá hann týsdagin m.a. skrivar, at Dagur og Vika tekur alla orkuna hjá manningini í Svf.

Nú hava vit nærum í 20 ár havt sendingar, ið tappaðar eru frá útlendskum rásum, meðan alt verður gjørt fyri at fáa eina góða tíðindasending. Har ein stórur asfaltvegur fjalir hálvan sjónvarpsrútin, tá onkur útlendingur skal navngevast á skrift, tí navnið jú stendur á donskum ella norskum undir asfaltrúgvuni(!).

Setir ein seg at hugsa um slíkt, so er lætt at gerast múlatrútin. Men vónina um glottar fyri framman eiga vit, uttan at nakar – víkingur ella ikki – kann taka hana frá okkum ella leggja avgjald á.

Leið 5

Markleysa ríkið



Okkara køkur

Herbie í Monte Carlo